# Eysturbúgvar búgva seg út

**Felagið Eysturbúgvar, sum er áhugafelag fyri íbúgvarnar í eysturbýnum í Havn, hevur fingið nýggja heimasíðu. Eisini hevur felagið stórar ætlanir um grannalagið sum heild**

BÝARLÍV
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Nevndin í felagnum Eysturbúgvar hevur veruliga brotið upp um armar seinastu tíðina.

Millum annað hevur felagið júst fingið nýggja heimasíðu, har upplýst verður um virksemið felagsins. Bæði um føstu tiltøkini, so sum føstulávintsog nýggjaárhaldið, og um nevndarfundir, avgerðir og ætlanir hjá felagnum annars. Harumframt hevur heimasíðan eitt kjaktorg, har limir og grannar sleppa til orðanna.

- Vit vóna, at fleiri fara at nýta kjaktorgið á síðuni at siga sína hugsan um, hvat tey halda at felagið skal brúkast til, sigur nevndin á heimasíðuni.

Felagið Eysturbúgvar fevnir um grannalagið í Eysturbýnum í Havn. Frá Jónas Bronx niðan í Eysturskúlan og har um leiðir. Her búgva fleiri túsund fólk, sum øll kunnu fáa gleði av felags tilboðum og økjum í grannalagnum.

### Sjeina spæliplássið

Komandi tíðina fer nevndin eisini at gera sítt til at fáa fleiri gjaldandi limir í felagið. Eitt nú við at ganga hurð á hurð í grannalagnum, so fólk kunnu seta seg fyri fasta flyting av limagjaldi. Eisini verður ein faldari borin í hvørt hús í Eysturbýnum. Limagjaldið er 150 krónur árliga fyri húskið.

Ein miðdepil í grannalagnum er gamla spæliplássið við Túnini í Bókbindaragøtu/Krossgøtu / Eysturstræti. Felagið hevur ætlanir um at seta spæliplássið í stand, og tí verður skipað fyri arbeiðsdøgum komandi tíðina, har sjálvboðin seta spælitorn, nýggj fótbóltsmál og eina stóra felags grill. Til hetta arbeiðið er brúk fyri røskum eysturbúgvum, sum kunnu taka eina hond í mánakvøldið 8. Juni og mikukvøldið 10. Juni, bæði kvøldini kl. 19.00.

### Kross í kalendaran

Gongst sum Eysturbúgvafelagið ætlar verður alt komið uppá pláss, tá ið árligi ruddingar- og grilldagurin verður fríggjadagin 19. juni. Felagið hevur bjóðað umboðum fyri Tórshavnar Kommunu, sum hevur staðið fyri figgingini, framvið at siga nøkur orð, meðan børnini klintra og sparka og tey vaksnu royna nýggju grillina.

Heima síðan hjá felagnum eitur: www.eysturbugvar.com



Mynd: Av heimasíðuni www.eysturbugvar.com

# Føroysk olja frá Ettrick í juli

**Atlantic Petroleum boðar nú frá, at fyrsta oljan frá Ettrick leiðini í bretskum øki gerst veruleiki um ein mánað**

OLJA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Aoka Mizu, sum er eitt FPSO skip (framleiðslu og goymsluskip, red.) er júst komið á leiðina í Norðsjónum eftir at hava siglt teinin úr Rotterdam. Komandi mánaðin verður gjørt klárt til fyrstu framleiðsluna frá feltinum, sum føroyska oljufelagið eigur lut í. Føroyski parturin er 8,27%. Hini feløgini eru Nexen, sum er fyristøðufelag við 79,73% og Dana við 12%.

Aoka Mizu verður langtíðarleiga frá Bluewater. Skipið hevur eitt framleiðsluføri til 30.000 tunnur av olju, og 35 MMscfpd av gassi um dagin. Nettoframleiðslan til Atlantic Petroleum verður væntandi umleið 1,650 tunnur (boepd) um dagin.

Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum sigur, at teir eru ernir av at kunna siga partaeigarunum frá hesi stóru hending, sum fer at skapa neyðuga grundarlagið undir enn eini framleiðslu hjá felagnum. Hann vísir á, at tað hevur tikið tíð og orku at røkka so langt. Hetta merkir, at felagið skjótt fer at vera við í tveimum framleiðandi oljukeldum í Norðsjónum og gevur tað felagnum eitt frábera gott grundarlag undir víðari menning. Hann leggur aftrat, at tað í grannalagnum á Ettrickleiðini finnast møguleikar, sum kunnu spæla ein týðandi leiklut í framtíðar menningini í økinum.



*Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum: -Framleiðslan frá Ettrick fer at hava stóran týdning fyri framtíðar menningina av felagnum*



*FPSO oljuskipið, sum er leigað av eitt nú Atlantic Petroleum at taka olju upp úr Ettrick feltinum er komið uppá pláss. Mynd Atlantic Petroleum*


Avloysarastarv í Apoteksverkinum

Apoteksverkið hevur eitt avloysarastarv leyst á fíggjardeildini til setan frá 15.juni ella sum skjótast, til uml. 1.sept. 2009.

Starvið fevnir um tollavgreiðslu og vanligt skrivstovuarbeiði.

Fyrimunur er at hava skrivstovuútbúgving ella arbeiðsroyndir innan økið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sæt til Jonnu Djurhuus, fíggjarleiðara á tlf. 350150

Apoteksverkið - Staravegur 15 -100 Tórshavn



Eysturkommuna

Størv til Dagstovnin í Gøtu

Søkt verður eftir námsfrøðingum at byrja 10. august 2009 1 námsfrøðing til barnagarðsstovuna »á Látrinum«, 20 tímar um vikuna.

1 námsfrøðing til barnagarðsstovuna »í Gjónni«, 20 tímar um vikuna. Í hesu stovuni leggja starvsfólkini serliga stóran dent á filosofiuna hjá Reggoi Emiliu.

1 námsfrøðing til barnagarðsstovuna »á Helluni«, 30 tímar um vikuna.

1 Starv sum stuðul, á 20 tímar um vikuna, til barn við serligum tørvi.

**Um stovnin:**
Dagstovnurin lat upp 1. februar 2000, og er ásettur til 70 børn. Talan er um 3 barnagarðsstovur og 1 smábarnastovu. Stovnurin liggur í barnavinarligum umhvørvi, við Gøtugjógv.

**Førleikakrøv:**
- Námsfrøðiliga útbúgving.
- Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk fyribils sett ístaðin.

**Vit ynskja av tær:**
- at tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir.
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroytt-an og tryggan gerandisdag.
- at tú vilt vera við til at mynda og menna tað námsfrøðiliga umhvørvið.
- at tú, undir ábyrgd av leiðslu og samstarvi við starvsfólkið, vil verða við til at mynda og menna tað námsfrøðiliga umhvørvið á dagstovninum.

**Í dagliga arbeiðinum leggja vit m. a. dent á:**
- at børn og starvsfólk trívast, og fáa avbjóðingar í gerandisdegnum.
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn.
- at virða tað einstaka barnið
- at ferðast nógv í náttúruni.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðagevarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera Eysturkommunu, Postboks 30, 510 Gøta í hendi í seinasta lagi týsdagin 09. juni 2009.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Torgerð Hansen, stovnsleiðara, á telefon 73 00 51.



EIN ÓHEFT SERFØROYSK ALTJÓÐA SKRIVARATÆNASTA

Skrivarin.fo
- persónlig nettænasta

- Reinskriving
- Rættlesing
- Uppseting
- Týðing
- Ymist

www.skrivarin.fo - info@skrivarin.fo